# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað er einki hald í søgunum um, at Osama bin Laden er sjúkur. Hann hevur tað gott*

*Ayman al-Zawahiri*

# Ingrid Betancourt deyðasjúk

**Óváttað tíðindi vilja vera við, at fyrrverandi kolombiska forsetavalevnið Ingrid Betancourt hevur ikki nógvar dagar eftir at liva**

- Vit vóna tað besta. Vit hava gjørt tað, sum stendur í okkara makt, og nú bíða vit bara eftir, at vit sleppa at veita Ingrid hjálp, sigur franski uttanríkisráðharrin, Bernard Kourchner.

Ingrid Betancourt hevur verið gísli hjá vinstrasinnaðu rørsluni FARC í Kolombia seinastu seks árini. Herfyri frættist, at hon var sjúk, og seinastu dagarnar hevur ljóðað, at hon hevur bara nakrar dagar eftir, fær hon ikki hjálp.

Ingrid Betancourt var gift fransmanni og er tí franskur ríkisborgari. Frakland sendi í gjár ein lækna og røktarfólk til Kolombia, eftir at samráðingar hava verið við FARC um at lata Ingrid Betancourt leysa. Nicolas Sarkozy, forseti, segði í gjár, at kolombisku myndugleikarnir eru gingnir við til at steðga øllum hernaðarligum atgerðum, so Ingrid Betancourt kann fáa hjálp.

Men ein tíðindamaður hjá BBC, sum hevur fylt málinum, sigur seg hava smáar vónir um, at burturflytararnir fara at lata Ingrid Betancourt leysa, sjálvt um hon er illa sjúk.



*Í skjótt seks ár hevur Ingrid Betancourt verið gísli. Hon sigst hon vera deyðasjúk*
*Mynd: Polfoto*

# Aftur kalt millum Norður- og Suðurkorea

**Ein suðurkoreanskur generalur hevur sambært norðurkoreonsku stjórnini sagt ov nógv, og so er aftur kalt millum tey bæði koreonsku londini**

Norðurkorea hevur kvett alt samskifti við grannalandið Suðurkorea, tí ein suðurkoreanskur generalur sýtir fyri at biðja um umbering fyri at hava spilt Norðurkorea út. Tað skrivar almenna norðurkoreanska tíðindastovan KCNA.

Í seinastuni hava norðurkoreanar roynt fleiri stuttberandi rakettir, og tað fekk ein suðurkoreanskan general sat siga, at Suðurkorea má fyrireika seg til at raka áвís norðurkoreonsk kjarnorkumál, um Norðurkorea vísir tekin um álopsætlanir.

Norðurkorea vil vera við, at tað er Suðurkorea, sum hevur skyldina av, at viðurskiftini millum londini eru kølnað í seinastuni. Norðurkorea hevur stongt markið millum londini, men suðurkoreanska stjórnin hevur svarað við at mæla grannalandinum til at gevast við hernaðarliga ágangninum og at tosa um frið ístaðin fyri, skrivar Reuters.



# Funnu gamalt hálsprýði

Fornfrøðingar hava funnið eitt hálsprýði nærhendis Titicaca-vatninum har suðuri í Peru. Kanningar vísa, at hálsprýðið er umleið 4.000 ára gamalt og tískil tað elsta fornminnið, sum er funnið í Suðuramerika. Granskararnir siga, at hálsprýðið er gjørt út gullmolum, og tað er tekin um, at slíkir prýðislutir hava verið har, langt áðrenn inkamentanin og mayanamentanin vórðu til. Hálsprýðið varð funnið í einari grøv í einari bygd, har fólk hava búð millum 1.500 og 3.000 ár fyri okkara tíðarrokning, skrivar Reuters.

## STUTT SAGT

### Leitar eftir varaforseta

John McCain, sum stillar upp fyri republikanararnar á amerikanska forsetavalinum í novembur, er nú farin undir at finna sær eitt varaforsetaevni. Tíðliga í septembur hevur republikanski flokkurin tann endaliga uppstillingarfundin, og John McCain sigur, at hann ætlar sær at finna varaforsetaevnið innan ta tíð. Amerikonsku fjølmiðlarnir hava gitt dúgliga, hvør verður varaforsetaevni hjá McCain, men sjálvur vil hann eink isiga. Tá ein útvarpsstøð setti honum spurningin nú um dagarnar, svaraði hann stutt, at hann er júst byrjaður at leita.

### Qurechi aftur til arbeiðis

Kamal Qurechi, fólkatingsmaður hjá Sosialistiska Fólkaflokkinum, byrjar nú aftur í teimum flokspolitisku størvunum, sum hann misti, tá hann bleiv lagdur undir at hava brúkt falskt navn í sambandi við ein leigusáttmála. Haraftrurar kom fram, at hann royndi at snýta, tá hann tók prógv sum lækni, men at tað bleiv avdúkað, og at hann mátti taka eitt hálvt ár umaftur. Nú hava Kamal Qurechi og leiðslan í tingbólkinum hjá SF slættað sjógtvin, og Qurechi fær síni framsøgustørv aftur, sigur SF í tíðindaskrivi.

### Mótmæltu í Bruxelles

Umleið 200 útlagnir tibetanar gingu í gjár mótmælisgongu uttan fyri ES-høvuðsstøðina í Bruxelles, har tey vildu hava ES at kanna kinesisku framferðina ímóti mótmælisfólki í Tibet. Harafturat mæltu tey ES-londunum til at boykotta teir olympisku leikirnar, sum verða í Kina í summar. Tibetanskir talsmenn vilja vera við, at millum 135 og 140 fólk hava latið lív í samanbrestum í Tibet, og at umleið 1.000 hava fingið skaða. Kinesisku myndugleikarnir siga haraftur-ímóti, at 18 fólk eru deyð í ófriðinum.